# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Búrhandilin 150 ár:

## Handlað síðan einahandilin varð avtikin



*Kristoffer Poulsen og starvsfólkini, f.v.: Poulina Poulsen (mamma Kristoffer) Barbara Poulsen (kona Kristoffer), Petsy Nielsen, og Joan Olsen*

**Leygardagin 13. mai var móttøka í Búrhandlinum í Skopun, í sambandi við at handilin fylti 150 ár. Búrhandilin er vist elsti handil í Føroyum, sum er skráðsettur sum firma og verður framvegis rikin sum kolonialhandil**

MÓTTØKA

Umleið 500 fólk vitjaðu í Búrhandlinum í Skopun í vikuskuftinum, har tey fingu kaffi við onkrum góðum afturvið og kundu hyggja at eini myndaframsýning, ið var sett upp í samband við føðingardagin.

Handilin er framvegis á somu grund í Skopun, har hann á fyrsta sinni varð bygdur og hevur verið í somu familju í seks ættarlið.

Tað var 13. mai 1856 at Johan Hendrik Poulsen, sum tann fyrsti í Skopun, fekk handilsloyvi og fór undir at handla í smáum. Johan Hendrik Poulsen var annar av niðursetumonnunum í Skopun saman við Mikkjal undir Skarði.

Johan Hendrik átti bát saman við Dímunar Jóannesi, Sámal í Gørðum og Peturi Hentze. Í 1856 keypti Jóhan Hendrik bæði bát og neyst frá hinum trimum fyri 30 rikisdálar. Við hesum keypi legði hann partvís lunnar undir handilsvirksemi sítt. Kongiligi handilin, sum tá fór í søguna, átti fleiri pakkhús.

Jóhan Hendrik keypti okkurt av hesum húsum, flutti tað til Skopunar og setti tað upp aftur sum handilshús. Seinni fekk handilin navnið Búrhandilin.

Bygdin vaks nógv í 1870- og 80 árunum, og útróðurin var nógvur. Búrhandilin hevði fiskakjallara bæði undir handilsbygninginum og gomlu Búrahúsunum. Handilin tók ímóti fiski í umleið 100 ár. Fyrst í 1960-árunum gavst handilin at keypa fisk frá smábátum. Handilin hevði eisini bakarí í fleiri ár.

Eftir Johan Hendrik tóku synirnir Jóhan Pauli og Klæmint yvir. Í 1908 tók Jens Marius Poulsen við eftir pápan, Klæmint. Hann fekk bøtt munandi um umstøðurnar at taka ímóti fiski, tá havnin var liðug. Til dømis varð nýggjur fiskakjallari og nýtt pakkhús bygt í 1926.

Eftir kríggið yvirtók Kristoffer Poulsen, sonur Jens Marius, handilin. Umleið 1949 fór hann undir at nútímansgera fyritøkuna við t.d. ljósmotori og kuldagoymslu á pakkhúsloftinum. Havnarlagið fekk eisini ljós frá hesum motori, inntil elverkið kom í 1956 - sama árið sum handilin fylti 100 ár.

Í 1991 seldi Kristoffer Poulsen abbasoninum, sum ber sama navnið, handilin. Hesin Kristoffer, sum rekur handilin í dag, er sonur Petur Poulsen.

Búrhandilin hevði eisini í mong ár postavgreiðsluna um hendi. Handilin hevur verið ein savnandi depil í bygdini og ein partur av sjálvari bygdarmentanini.






*Kristoffer Poulsen yngri og eldri. Yngri tók við Búrhandlinum eftir abban í 1991*



*Siborg Poulsen, omma Kristoffer, sum sjálv hevur avgreitt mangan kundan í Búrhandlinum*



*Myndaframsýningin hevði stóran áhuga hjá teimum vitjandi, f.v.: Kristoffer Poulsen, Jens Marius Hentze, Gullbrand Tungá og Petur Poulsen*



*Nógv fremmand fólk úr allari oynni komu í føðingardag hjá Búrhandlinum, eisini Ólavur Højgaard á Argjum, sangarin í Vestmonnum*



*Nógvar áhugaverdar myndir og lutir eru at síggja hesa vikuna í Búrhandlinum*




*Fólk hugnaðu sær óført undir móttøkuni*